

*Løkshøll er navnið á nýggja mentanarhúsinum í Runavík*

*Mynd: Vilmund Jacobsen*

# Kvøldseta á eystanstevnu

Mentanarhúsfelagið tekur nú táttin upp aftur og fer at skipa fyri kvøldsetu á eystanstevnu. Á skránni verða millum aðrar Hans Jacob Kollslíð, Kári Sverrisson og Hanus G. Johansen.

Kvøldsetan hesaferð er heilt serlig, tí hetta er fyrstu ferð, at felagið skipar fyri tiltaki í nýggja mentanardeplinum í Runavík, sum hevur fingið navnið Løkshøll.

Mentanarhúsfelagið hevur í nógv ár arbeitt fyri at fáa eitt mentanarhús í Runavík, og nú er dreymurin loksins gingin út.

Løkshøll er eitt samstarv millum Runavíkar kommunu, ið hevur latið høllina byggja sum part av skúlanum og Mentanarhúsfelagið, ið stendur fyri innbúgvi og ljóð- og ljósútgerð.

Tað verður Mentanarhúsfelagið sum fer at reka virksemið í Løkshøll. Nøkur smærri tiltøk hava longu verið og ætlanin er at skipa fyri einum stórfingnum upplatingartiltakið í heyst.

Á kvøldsetuni, sum verður fríggjakvøldið, verður høvi at hoyra fløguaktuellu Hans Jacob Kollslíð & Kára Sverrisson og ein av Føroya best umtóktu vísusangarum, Hanus G. Johansen.

Eisini verður búmerki, sum lýsingarfyritøkan Sendistovan hevur gjørt, avdúkað. Vinnarin av navnakappingini, ið felagið læt skriva út fyrr í ár, fær virðisløn handaða.

Á kvøldsetuni verður eisini høvi at keypa sær okkurt gott í steðginum.



# Vitjið Bygdarsavnið Forna

Gjøgnum nógv ár hevur innsavningin av lutum og myndum vaksið um bygdarsavnið Forna á Glyvrum, og í dag er savnið bæði umfatandi og áhugavert.

Húsið er innrættað við eini gamlari stovu frá 1874, gomlum handli frá fyrra helmingi av farnu øld, gomlum køki og gomlum kamari – alt við tilhoyrandi innbúgvi.

Á framsýningini á savninum eru nógvar gamlar myndir, sum eitt nú lýsa dagliga yrki, hús og bátar í gamlari tíð.

Vanliga er Bygdasavnið opið hvønn mánadag og mikudag frá klokkan 16-18, men á eystanstevnu er savnið eisini opið leygardagin og sunnudagin frá klokkan 16-19.00.

Bygdasavnið Forni á Glyvrum er avgjørt vert eina vitjan.

*Bygdarsavnið Forni er avgjørt eina vitjan vert. Á eystanstevnu hevur savnið eisini opið leygardag og sunnudag*

*Mynd: Vilmund Jacobsen*

## Svanur luttekur eisini

Sum nakað nýtt verður Svanur við á eystanstevnun í ár. Hetta nýggja felag hevur til endamáls at menna ítróttin og at skapa áhuga fyri ítrótti millum fólk við breki í Eysturoynni.

Hetta er fyrsta stevnuárið, at Svanur er umboðað, og í hesum sambandi heitir felagið á sínar limir um at møta upp til karnivalgonguna.

Skipað verður eisini fyri boccia-kapping við stevnuøkið í Runavík leygardagin klokkan 18. Kappingin er fyri øll, og tað er ikki neyðugt at tekna seg fyri at verða við.

Limir í Svani og onnur áhugaði kunnu ogna sær T-shirtir, búnar ella jakkar við búmerkinum á við at vendar sær til felagið ella á www.svanur.fo.

Svanur, sum ynskir øllum eina góða eystanstevnu, ynskir at varpa ljós á, at ítróttur er fyri øll, og at øll kunnu hava tað stuttligt við ítrótti.

## Karnevalur í staðin fyri skrúðgongu

Tað verða í fyrsta lagi ítróttarfólk, sum fara at ganga karnivalsgongu í Runavík fríggjakvøldið. Stevnunevndin hevur soleiðis gjørt av at taka væleydnaða tiltakið, sum fyrstu ferð varð roynt á eystanstevnu í fjør, uppaftur.

Heldur enn at hava skrúðgongu leygardag, hava fyriskipararnir gjørt av at endurtaka "hittið" frá í fjør. Soleiðis verður stór karnivalsgonga, áðrenn stevnan verður sett fríggjakvøldið klokkan 20.

Farið verður av økinum við ítróttarhøllina í Runavík klokkan 19, og gingið verður heim á stevnuøkið, har ítróttarfólk fara at hava ymiskar framførslur.

Eisini verða maskottar og annað spennandi at síggja í skrúðgonguni, sum fyrireikararnir ikki vilja avdúka frammanundan.